Kvinnur í politikki:

# Nú má vend koma í

**Hans Pauli Strøm fer í næstum at leggja eitt uppskot fyri tingið, ið hevur til endamáls at fáa fleiri kvinnur uppí politikk. Verður tað samtykt, skal ein nevnd setast í eitt trý ára skeið, ið skal virka fyri at fáa kvinnur í politikk**



– *Í januar komandi ár kemur eitt uppskot fyri tingið, ið skal fáa fleiri kvinnur uppí politikk. Átakið varð framt í Íslandi við góðum úrslitum, sigur Hans Pauli Strøm*

UPPSKOT
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Uppskotið um at fáa fleiri kvinnur í politska arbeiðið botnar í eini tilráðing, sum bæði Føroyar og Grønland hava fingið frá útnorðurráðnum. Ein nevnd skal setast, sum skal geva út ymiskt tilfar, fremja lýsingarátøk, fáa kjak í lag og annað.

Hetta er eitt átak, sum eydnaðist sera væl í Íslandi, tá tað varð roynt har. Altingið setti, fyri einum 4-5 árum síðani, eina tilíka nevnd, og tað gav sera gott úrslit, tí talið av kvinnum í politikki vaks munandi eftir átakið.

Nú er uppskriftin so send til Føroya, og Hans Pauli Støm, landstýrismaður, tekur tilráðingina í størsta álvara.

### Allir flokkar skulu við

– Ætlanin er at seta eina nevnd, sum skal vera mannað av umleið 10 fólkum. Henda nevndin verður ikki sett með alla, men bert í eitt trýára skeið. Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt síðst í 2007, beint áðrenn næsta løgtingsval, greiðir Hans Pauli Strøm frá

Nevndin verður mannað við einum umboði frá hvørjum flokki.

Hans Pauli Strøm sigur tað vera alt avgerðandi, at allir flokkar taka undir við uppskotinum, fyri at tað skal kunna fungera.

– Hetta er eitt uppskot, sum ikki er bundið at samgongu- og andstøðupolitikki, og heldur ikki at flokspolitikki. Eg veit, at innanhýsis í øllum flokkunum eru fólk rúkandi ósamd um, hvørt henda nevndin er neyðug ella ikki. Men um meirilutin í øllum flokkunum ikki stuðlar nevdini, so nyttar tað ikki, staðfestir Hans Pauli.

Men fær uppskotið undirtøku, skulu flokkarnir sjálvir velja sær eitt umboð í nevndina.

– Tað er ikki neyðugt, at umboðini eru tingfólk. Tað kunnu eins væl vera fólk, ið bert eru limir í flokkinum, og sum kanska eru von at umboða flokkin í slíkum málum, sigur Hans Pauli.

Síðani vera tvey umboð fyri kommunufeløgini, 1 umboð fyri kvinnufelagssamskipanina og eitt umboð fyri landstýrið, allarhelst onkur av løgmansskrivstovuni.

### Ikki rætta veljaran

– Tað er øllum kunnugt, at tað er ein ógvuliga skeiv gongd innan politikkin. Av 32 tingmonnum eru bert 3 konufólk, so man má staðfesta, at gongdin er versnandi. Tí má okkurt gerast og hetta er so ein roynd, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at tað er frægari at arbeiða á hendan hátt, við eini nevnd, ið kemur við hugskotum og fær fólk at hugsa um trupulleikan, heldur enn at kroysta ein politikk niður yvir flokkarnar, t.d. við at eitt ávíst lutfall av konufólkum og mannfólkum skal vera á listunum og í tinginum.

– Eg trúgvi ikki, at tað hevði verið serliga væl móttikið í Føroyum, at man tók eina politiska avgerð um, hvussu nógv mann- og konufólk flokkarnir kundu havt á listunum. Hetta er í staðin ein nakað varligari roynd at fáa kvinnurnar við, uttan at taka fría valrættin frá veljarunum, sigur Hans Pauli Støm, og leggur afturat,

– Hetta er ikki ein kritikkur av veljarunum, men heldur ein roynd at rætta skeivu gongdina við at seta fokus á, at tað er ein trupulleiki og at vekja áhuga fyri evninum, sigur hann.

### Fyri í januar

Uppskotið er farið til hoyringar í landstýrinum og væntandi verður tað lagt fyri tingið til samtyktar í januar.

– Eg havi fingið fleiri munnligar fyrispurningar um, nær hetta uppskotið fer at koma. So tað eru fólk, sum eru áhugað. Hinvegin veit eg eisini, at tað eru fleiri, sum als ikki halda hetta vera neyðugt, sigur Hans Pauli Strøm og leggur dent á, at hetta er eitt uppskot, har allir tingmenn standa fríir, og skulu atkvøða eftir egnari sannføring.

Uppleggið er sera varið, júst tí, at meiningarnar um evnið eru so sterkar og ymiskar.

– Nevndin skal skipa fyri tiltøkum, skeiðum, lýsingarátøkum, skapa áhuga og seta fokus á skeivleikarnar, sum eru. Men hetta fær bara effekt um undirtøkan er breið, og allir flokkarnir stuðla ætlanini, leggur Hans Pauli Strøm dent á.

Átakið verður tó ikki heilt ókeypis.

– Enn er ikki greitt hvør kostnaðurin verður og hvør skal fíggja tað. Um løgtingið ikki heldur tað vera neyðugt við eini slíkari nevnd, verður uppskotið ikki samtykt, og so verður jú eingin kostnaður, sigur landstýrismaðurin.

Verður tað hinvegin samtykt, verður peningurin funnin tá.

## Tað virkaði í Íslandi

Siv Friðleifsdóttir var forkvinna í nevndini, ið skuldi fáa fleiri kvinnur á ting í Íslandi.

Nevndin fór til verka um heystið í 1995. Provokerandi reklamur, opnir politiskir fundir, skeið, ráðstevnur, faldarar o.a. var úrslitið av arbeiðnum hjá nevndini. Eftir átakið vuksu kvinnuligu umboðini í Altinginum í tali úr 25% í 1995 heilt upp til 35% í 1998.

Siv Friðleifsdóttir heldur tó, at tað týdningarmesta fyri at fáa kvinnur í politikk er, at flokkarnir sjálvir hava viljan at sleppa kvinnunum framat.

Siv heldur, at alstórur tørvur er á líknandi tiltøkum í Føroyum, serliga eftir seinasta val

Í Føroyum er kvinnuumboðanin á tingi bert 9%

Í Landsstýrinum er kvinnuumboðanin 0%

**.eys**

# Amtmannsgarðurin letur upp

**Um føroyingar hava ynskt at sæð inn í vakra Amtmannsgarðin, hevur higartil verið neyðugt at klivið upp um garðin, ella á annan hátt sníkt seg inn fyri at njóta avbera vakra garðin. Men ríkisumboðið ætlar nú at lata Amtmannsgarðin upp á mentanatnáttini komandi summar**



*Á komandi summarmentanarnáttini verður møguligt hjá almenninginum at vitja inn í Amtmansgarðin, sigur Birgit Kleis í skrivi til Sosialin*

MENTANARNÁTT
*Eydna@sosialurin.fo*

Nógv kjak hevur verið um hvørt Amtmannsgarðurin skal latast upp fyri almenninginum ella ikki. Nógvir føroyingar – og kanska serliga havnarmenn, hava hildið, at tað átti at verið øllum møguligt at njóta garðin.

Seinasta íkastið til kjakið var í leygardagssosialinum, tá komandi ríkisumboð varð boðið vælkomið til Føroya. Eisini var í greinini ein áheitan á hann, um at lata Amtmannsgarðin upp fyri almenninginum.

Tí ynskir onkur at síggja inn i garðin, sum er, er antin neyðugt at klíva upp um og snikja seg innar, ella at fáa eitt vindeygapláss á restaurant Hafnia, hinumegin Àarvegin.

Núverandi ríkisumboðið Birgit Kleis sigur nú í einum skrivi, at afturhaldni við at lata garðin upp serliga kemst av, at ótti er fyri, at garðurin verður illa viðfarin og misnýttur.

Víðari sigur hon, at talan eisini er um ein garð, sum er ramman um heimið hjá eini familju. Tí hava ríkisumboðini verið so trek við at lata garðin upp fyri almenninginum. Onkuntíð hevur verið ført fram, at Amtmannsgarðurin átti at verið latin føroysku myndugleikunum. Hetta sigur Ríkisumboðið seg tó ikki hava nakra viðmerking til.

### Opið mentanarnáttina

Í skrivi til Sosialin sigur Birgit Kleis tó, at tað er púra rætt, at garðurin er framúr vakur, serliga í summarmánaðunum. Og at hon tí væl skilir, at fólk ynskja at sleppa inn.

Hon sigur, at hon sjálv var og vitjaði Boysengarð, sum eisini vanliga er stongdur, seinasta summar, tá mentanarnáttin varð hildin í Havn.

Boysengarður er eisini fantastiska vakur um summarið, um enn hann ikki er eins stórur og Amtmannsgarðurin.

Seinast í skrivinum staðfestir Ríkisumboðið tó tað, sum okkum leingi hevur longst eftir at hoyra. Amtmannsgarðurin letur upp.

– Næsta ár ætla vit at fylgja við og hava Amtmannsgarðin opnan Mentanarnáttina – fyri at vísa góðan vilja og møguliga eisini eina varliga byrjan á nýggjar tíðir.

Birgit Kleis veðrur í starvinum sum ríkisumboð inntil 1. august. Eftir hana tekur Søren Christensen við starvinum.